# Formula undirveitari hjá risafyritøkuni Siemens

**Føroyska teldufyritøkan, Formula, hevur gjørt samstarvsavtalu við týsku risafyritøkuna Siemens. Forritið er ment í Føroyum, og føroyski heimamarknaðurin hevur verið avgerandi fyri, at Formula kann breggja sær av hava fingið avtalu við Siemens í lag**

NÝTT FORRIT
*Páll Holm Johannesen*

Mánakvøldið í Útvarpi Føroya kundi stjórin á teldufyritøkuni Formula, Fróði Magnussen, boða frá, at Formula hevur fingið avtalu sum undirveitari fyri risafyritøkuni Siemens.

Talan er um eitt forrit til ein telefonvekslara. Føroyska fyritøkan hevur arbeitt við forritinum seinastu tvey árini, og Siemens hevur so stóran áhuga í føroysku framleiðsluni, at partarnir undirskrivaðu samstarvsavtalu í vár.




*Teir báðir Torkil Holm (t.v) og Fróði Magnussen hava alla grund at verða fegnir í hesum døgum. Formula hevur fingið avtalu í lag sum undirveitari við risafyritøkuna Siemens. Talan er um eitt forrit til ein telefonvekslara*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Forritið ment á Formula

Hugskotið við nýggja forritinum hjá Formula er sprottið út í fyritøkuni sjálvari. Fyri góðum seks árum síðan vantaði Formula eina skipan, har fyritøkan til ein og hvørja tíð kundi síggja, hvar starvsfólkini vóru at hitta.

Fyri at loysa tann trupulleikan, setti fyritøkan sær fyri loysa tørvin við sjálv at menna eina skipan, sum kundi fylgja við, um starvsfólki á Formula var inni, úti ella nær tey vórðu tøk. Skipanin kallast ein inn/út skipan, og fleiri føroyskar fyritøkur nýta í dag forritið, sum Formula hevur ment.

Formula vildi í 2001 taka inn/út skipanina eitt stig víðari, og menna hana enn meir. Ein trupulleiki var, at fólki á Formula ynskti eina skipan, har telefon og telda kundu samantvinnast. Á teldumarknaðinum var ein slík skipan ikki at fáa eyga á, og tískil setti Formula sær fyri sjálv at gera eina slíka skipan.

Føroyska fyritøkan setti seg í samband við donsku deildina hjá Siemens, og hon vísti Formula víðari til týsku deildina, sum alt fyri eitt var áhugað í føroyska hugskotinum. Teir kendu ikki til nakra framleiðslu, har telefon og telda gingu saman á tann hátt, sum Formula hevði valt at gera skipanina

Seinni í 2001 samdust Siemens og Formula um at gera eina samstarvsavtalu, har fyritøkurnar í felag skuldu menna nýggja forritið. Síðan 2001 hava so fyritøkurnar arbeitt saman um forritið, og fyrr í vár varð so endalig avtala fingin í lag um, at føroyska fyritøkan skuldi verða undirveitari hjá risafyritøkuni Siemens.

Avtalan inniber, at forritið verður marknaðarført av Siemens sum ein framleiðsla hjá Siemens. Í løtuni verður forritið selt í Noregi, Svøríki og Danmark. Tá mett verður, at nóg nógvar royndir eru gjørdar í Norðanlondum, er ætlanin at fara út um Norðanlond við forritinum.

Stjórin á Formula, Fróði Magnussen, sigur, at enn er ov tíðliga at siga nakað um søluna, tí ikki fyrr enn um eitt gott ár ber til at siga nakað ítøkiligt um, hvussu forritið fer at standa seg á altjóða marknaðinum.

### Føroyski heimamarknaðurin avgerandi

Stjórin á Formula, Fróði Magnussen, sigur, at føroyski heimamarknaðurin hevur verið avgerandi fyri menningini av nýggja forritinum. Fróði nevnir, at fyri stórar altjóða fyritøkur, sum McDonalds, Coca Cola og Danfoss er heimamarknaðurin avgerandi, og so er eisini hjá Formula.

Hann fortelur, at Arbeiðseftirlitið, MBM, Løgmansskrivstovan, Vinnumálaráðið, Mentamálaráðið og Løgmálaráðið hava verið avgerandi og eru tað framvegis í menningini av nýggja forritinum hjá Formula. Fyritøkan hevur ment forritið í tøttum samstarvið við føroyska heimamarknaðin.

– Føroysku kundarnir hava absolut verið við til at ment forritið, og tað hevur havt við sær, at vit hava kunnað víst útlendingum eitt liðugt produkt, sum hevur verið roynt millum føroyskar kundar, og tað er avgjørt positivt yvirfyri útlendingunum, greiðir Fróði Magnussen at enda frá.

# Landsstýrismenn á fund í Norðurlandaráðnum

NORÐURLANDA-FUNDUR
*Páll Holm Johannesen*

Komandi mánadag hevur Norðurlandaráðið fund í Karlskrona í Svøríki. Tað eru ráðharrar í øllum norðurlendsku londunum, sum skulu røða um sosial- og heilsumál.

Fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Poul Schlüter, hevur gjørt eina kanning fyri Norðurlandaráðið um marknaðarføring, og úrslitið av kanningini verður eisini kunngjørt á fundinum mánadagin.



*Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, fer í komandi viku saman við Bill Justinussen á árliga ráðharrafundin í Norðurlandaráðnum*

### Føroysk umboð við

Bæði landsstýrismaðurin í almannamálum og heilsumálum, Páll á Reynatúgvu og Bill Justinussen, verða við á fundinum hjá Norðurlandaráðnum í Karlskrona. Páll á Reynatúgvu sigur, at árligi sosial- og heilsu ráðharrafundurin fevnir bara yvir tveir dagar, og tískil er avmarkað, hvat ein kann fáa burturúr stutta skotbráðnum.

Á almanna økinum verður røtt um almenna trygd og um sokallaðu Norbak rapportina. Rapportin snýr seg um rættindi hjá norðbúgvum at starvast í einum landi, uttan at hava fastan bústað í tí.

Í Føroyum hevur eisini verðið roynt at betra um tey viðurskiftini, Norbak rapport viðger. Páll á Reynatúgvu fer at leggja fram úrslitini fyri hinum norðurlendsku ráðharrunum í sosialmálum.

Landsstýrismaðurin í almannamálum leggur afturat, at slíkir ráharrafundir eru eitt frálíkt høvi til at finna út av, hvat aðrar norðurlendskir ráðharrar takast við í teirra londum.



# Súlurnar strúka avstað

**Atlantsflog bjóðar nú viðskiftafólki sínum nýggja bonusskipan, sum gevur rætt til ymiskar vinningar, alt eftir, hvusus nógvar ferðir tú hevur ferðast við flogførum felagsins**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Atlantsflog bjóðar viðskiftafólki sínum eina nýggja bonusskipan, tað sonevnda Súlukortið. Skipanin gevur rætt til ymsar virðislønir alt eftir, hvussu ofta verður ferðast.

Kappingin um ferðafólkini á loftleiðunum til og úr Føroyum harðnar. Bara nakrar fáar dagar eftir, at Maersk Air kom við einari serstakari bonusskipan á Føroyarutuni, boðar Atlantsflog frá, at felagið eisini hevur eina skipan, sum líkist hinari rættiliga nógv.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi, váttar, at tilboðið frá kappinganeytanum er atvoldin til, at hendan skipanin kemur beint nú.

– Vit høvdu nú ikki sett hetta sum tað sentrala kappingarpunktið, sigur Magni Arge. Vit hava heldur hug at kappast á øðrum økjum so sum fráferðum til tíðina, hægri tænastu umborð á flogførunum og slíkum, sum kemur ferðafólkunum til góðar.

Men ein slík skipan hevur ikki ligið teimum so øgiliga fjar, og tí bar eisini til at svara rættiliga skjótt aftur, sigur stjórin á Atlantsflogi. Skipanin er ikki so øgiliga ólíkt teirri Euro-Bonus skipanini sum galdandi hevur verið, og framvegis er í gildi, vísir hann á.

– Men tað man vera eindømi í europeiskari flogsøgu, at tvær so líkar bonusskipanir eru galdandi á somu fráferðum, sum vit síggja tað her, heldur Magni Arge.

Skipanin virkar soleiðis, at tá ferðafólkini veðra innskrivað í Vágum, fáa tey eitt sonenvt súlustempul á eitt súlukort, sum tey hava fingið frá ferðaskrivstovuni, ið seldi teimum feðraseðilin. Eisini kann kortið fáast á skrivstovuni hjá Atlantsflogi á flogvøllinum, greiðir Magni Arge frá.




*Atlantsflog svaraði skjótt aftur, tá kappingarneytin kom við eini bonusskipan á Føroyarutuni. Talan er um beinleiðis avleiðing av tí tilboðnum, váttar magni Arge, stjóri á Atlantsflogi*

*Mynd: Edvard Joensen*

Tilboðið er bert galdandi fyri fólk, sum eru myndug. Tað vil siga, at børn og ung undir 18 ár hava ikki møguleika at savna sær súlukort.

Heldur ikki er tilboðið gladandi fyri sponsorfeðrir og aðrar ferðaseðlar, sum ikki eru keyptir fyri galdandi listaprís. Kortini er tað ikki so, at um tú hevur vunnið ein ferðaseðil á bingo ella lutaseðli, at tú ikki fært súlustempul. Er seðilin goldin av tí, sum vinningin letur, hevur hann somu rættindi, sum aðrir feðraseðlar.

– Men beinleiðis sponsoreraðar ferðir sum eitt nú ferðaseðlarnir hjá fótbóltslandsliðnum, telja ikki við, staðfestir stjórin á Atlantsflogi.

Hóast súlukortið er persónligt, ber til at flyta vinningarnar ímillum fólk i sama húsi. Hevur eit nú maðurin savnað sær fimm súlukort, ber til hjá konuni at nýta vinningin, sum tá er ein ókeypis feðaseðil aftur og fram við Atlantsflogi, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi.

Vinningarnir kunnu heintast hjá Atlantsflogi í Føroyum, sigur Magni Arge.

# Nógv ferðsla gjøgnum Vágatunnilin

**Tað verður dúgliga ferðast undir Vestmannasundi. Einir 1.000 bilar koyra dagliga gjøgnum Vágatunnilin**

VÁGATUNNILIN
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Ferðslan undir Vestmannasundi er so nógv, sum hon ikki hevur verið fyrr. Einir 1.000 bilar koyra dagliga aftur og fram gjøgnum tunnilin.

Feriutíð er, og nógv fólk ferðast um flogvøllin. Nógv teirra koyra við egnum bili ella verða koyrd av vinum og skyldfólki. Eisini eru nógv fleiri frammandir bilar at síggja í Vágum í summar, enn verið hevur árini frammanundan, tá farast skuldi um Vestmannasund við ferju. Hetta eru í stóran mun bilar, sum bíða í Føroyum, meðan Norröna er í Bergen mánadag og týsdag.

Reinhold Isaksen á skrivstovuni hjá Vágatunlinum sigur, at tey tøl, hann hevur fingið í seinastuni, vísa, at tað dagliga eru umleið 500 gjaldingar til partaelagið Vágatunnilin. Tá so roknað verður við, at talan er um bilar, sum koyra aftur og fram, verður hildið, at einir 1.000 bilar eru í tunlinum um samdøgurðið.

Hetta eru tøl, tey eru nøgd við, sigur Reinhold Isaksen. Heilt neyv tøl fyri tað, sum farið er av august, hevur hann ikki, men roknar við, at talið ikki er lægri enn í juli, haðani talið við teimum 1.000 bilunum stavar.



*Tað koyra umleið 1.000 bilar aftur og fam gjøgnum Vágatunnilin um samdøgurðið*

*Mynd: Edvard Joensen*

Framvegis sita fólk allan sólarringin við tunnilsmunnan og krevja pengar frá fólki.

– Tað er ikki nøktandi, sigur Reinhold Isaksen, at gjaldskipanin ikki er í lagi enn. Men nú siga teir enn einaferð úr Keypmannahavn, at teir skulu fáa skipanina at rigga, og at teir koma upp hendanveg ein av fyrstu døgunum at avgreiða hetta. Og einaferð enn hava vit valt at trúgva teimum, sigur hann.